tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 25.03.2024 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, ~~Alvi Mortensen~~, ~~Jónleyg Jespersen~~ Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Eyð Jóna Eidesgaard

Varalimir: Mina Joensen, Frits Strøm

Ikki møtt: Alvi Mortensen og Jónleyg Jespersen Bech

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 11/24 | 24/00051-1 | Seglloftið - Dagføring/víðkan av brunaskipan |
| 12/24 | 24/00054-1 | Útskifting av lyklaskipan á gomlu bygningunum hjá T.F. Thomsen á havnarlagnum |
| 13/24 | 24/00055-1 | Útskifting av ljósum í ítróttarhøllini í Trongisvági |
| 14/24 | 24/00036-2 | Umsókn um broyting av byggisamtikt fyri matr. nr 16 á Sevmýri |
| 15/24 | 24/00088-5 | Kommunusamanlegging tilmælið um ”Vegleiðandi fólkaatkvøða"<br><br>nú álitið er handa 18. mars 2024 |
| 95.1/24 | 24/00089-2 | RFF -Ráðið fyri Ferðslutrygd ársfundur 2024 |
| 95.2/24 | 24/00090-3 | Kommunufelagið ársaðalfund 19. apríl 2024 -broyting av viðtøkum felagsins |
| 16/24 | 24/00091-2 | Umsókn um byggiloyvi til uppsetan av stáltangum og goymslutangum - Varðin Pelagic |
| **Til kunningar** | | |
| 9/24 | 24/00004-1 | Skattatøl 2024 |
| 10/24 | 22/00443-1 | Borgarstjórin fráboðar at hann fer í farloyvið/feriu |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri kunnar um, at Alvi Mortensen hevur fráboðað, at hann er staddur uttanlanda í feriu og Jónleyg Jespersen Bech hevur fráboða forfall til fundin.

Kommunustjórin hevur eftir áheitan av borgarstjóranum innkallað tiltakslim at møta ístaðin fyri Alva Mortensen og Jónleyg J. Bech.

Fyrsti (1) tiltakslimurin á lista "T" Felagslistin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020 er Jónhild Midjord Nybo, ið er stødd uttanlands í lestrarørindum og kann tí ikki møta. Mina Joensen, ið er næsti (2) tiltakslimurin á lista "T" Felagslistin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020 at møtir til býráðsfundin fyri Alva Mortensen.

Fyri Jónleyg Jespersen Bech møtir Frits Strøm, ið er triði (3) tiltakslimurin á lista "T" Felagslistin.

Kristin Michelsen boðar frá, at Mina Joensen hevur frammanundan havt sæti í býráðnum, og tekur sostatt sæti í býráðnum uttan atkvøðugreiðslu. Kristin Michelsen mælir til, at Frits Strøm tekur sæti fyri Jónleyg Bech -**Einmælt samtykt.**

Kristin Michelsen lesur skránna til býráðsfundin í dag og spyr um viðmerking eru til skránna -Ongin viðmerking.

Borgarstjórin mælir til mál -*16/24 verður sett á skrá "Umsókn um byggiloyvi til uppsetan av stáltangum og goymslutangum – P/F Varðin Pelagic".*

Eyð Eidesgaard metir seg at verða ógegniga í viðgerðini av málinum *"16/24 Umsókn um byggiloyvi til uppsettan av stáltangum og goymslutangum – P/F Varðin Pelagic"*, og fór av fundinum til hesa viðgerðina. **Einmælt samtykt at seta málið á skrá.**

**Til støðutakan**

## 11/24
## 24/00051-1 Seglloftið - Dagføring/víðkan av brunaskipan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.03.2024 | 16/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2024 | 19/24 |
| 3 Býráðið | 25.03.2024 | 11/24 |

**Málslýsing: Georg Müller tann 12.02.2024**

Pubbin og Pakkhús 5 eru ikki vard av nakrari roykvarnaraskipan. El-service, sum hava gjørt ABA-skipanina til Seglloftið og Pakkhús 4, hava kannað, um møguleiki er fyri at víðka verandi anlegg at umfata Pubbina og Pakkhús 5 eisini. Hetta er væl møguligt.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Tilboð frá El-service: **139.680 kr/uttan mvg***

* tað eru ymisk fyrivarni at taka atlit til, sum eru viðmerkt í tilboðnum frá El-service. Tí kann væntast ein meirkostnaður, sum ikki er við í hesari metingini

**Tilmælið:**
Eg vil viðmæla at finna eina loysn fyri teir báðar gomlu bygningarnar, sum ikki eru vardir av nakrari roykvarnaraskipan. Upplagt er at brúka somu skipan sum Seglloftið og Pakkhús 4. Veitarin garanterar, at sjálvt um anleggið hevur nógv ár á baki, er eingin orsøk at skifta tað út við nakra nýggjari skipan, og at eingin forðing er fyri at binda í gomlu skipanina.

**Tekniska nevnd 06. marts 2024:**
Nevndin tekur undir við at hetta verður gjørt.
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Kommunustjórin 10.03.2024:**
Ongin játtan er avsett á FÆ2024 til hesa íløgu. Mælt verður til, at hetta verður fíggja av §609 “bygging og løguframleiðsla”, annaðhvørt við eykajáttan ella við at flytan av játtan.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2024:**
Málið er viðgjørt og kunna. Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at taka av fyriliggjandi tilboði uppá tilfar, og at arbeiði/uppsetanin verður framt -í mest møguligan mun-, av starvsfólkum hjá teknisku deild. -málið skal hava tvinnar viðgerðir í býráðnum.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini. Málið skal hava tvinnar viðgerðir tá talan er um eykajáttan.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

## 12/24
## 24/00054-1 Útskifting av lyklaskipan á gomlu bygningunum hjá T.F. Thomsen á havnarlagnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.03.2024 | 17/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2024 | 20/24 |
| 3 Býráðið | 25.03.2024 | 12/24 |

**Málslýsing: Georg Müller tann 14.02.23**

Tað er sett eitt lyklaskáp upp á veggin uttanfyri Seglloftið við einum lykli í, sum sambært rýmingarætlanini til ABA-anleggið (Automatisk brandalarmanlæg) skal passa til allar rýmingarvegirnar, sum eru umfataðir av ABA-anlegginum, og har er Pakkhús 4 eisini ein partur av anlegginum.
Av tí at lykilin til Seglloftið ikki passar til Pakkhús 4 og umvent, kann man ikki siga, at anleggið riggar, sum tað skal. Tað er ikki loyvt, smbrt. Suna Ernstsson frá El-Service, at hava meir enn 1 lykil í lyklaskápinum. Hann skal passa til allar rýmingarvegirnar, og tað ger hann ikki, sum nú er.
Av hesi orsøk er ABA-anleggið ikki endaliga góðkent, og kann tí heldur ikki geva boð beinleiðis til alarmsentralin í verandi løtu.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Tilboð frá Sp/f Systemlyklar: **78.806 kr/uttan mvg**

**Tilmælið:**
Ein loysn uppá trupulleikan er at skifta øll lásini út við eina systemlyklaskipan; ein elektronisk skipan er besta loysnin.
Tekniska deild mælir eisini til at fáa Pubbina og Pakkhús 5 knýtt upp í somu skipan, so allir teir gomlu bygningarnir hava somu lásaskipan.
Hetta ger tað lættari at stýra ymisku leigumálunum í bygningunum, og er við til at framtíðartryggja einari útbygging av ABA-anlegginum, so tað eisini kemur at umfata Pubbina og Pakkhús 5.
Kommunan hevur longu eina lásaskipan, sum umfatar kommunukontórið og bygningin, sum húsar kontórunum hjá kommunustjóranum og borgarstjóranum. Ein víðkan av teirri skipanini, sum kommunan longu sjálv umsitur, kann gera, at lyklar o.a. kann umsitast í somu skipan av teknisku deild.
Um aðrir bygningar hjá kommununi koma uppí somu skipan seinni, er eisini møguleiki fyri at knýta teir uppí.

**Viðm.** Skúlarnir hava sína egnu elektronisku lásaskipan.

**Tekniska nevnd 06. marts 2024:**
Nevndin tekur undir við at hetta verður gjørt.
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Kommunustjórin 10.03.2024:**
Ongin játtan er avsett á FÆ2024 til hesa íløgu. Mælt verður til, at hetta verður fíggja av §609 "bygging og løguframleiðsla", annaðhvørt við eykajáttan ella við at flytan av játtan.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2024:**
Málið er viðgjørt og kunna. Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at taka av fyriliggjandi tilboði uppá tilfar, og at arbeiði/uppsetanin verður framt -í mest møguligan mun-, av starvsfólkum hjá teknisku deild. -málið skal hava tvinnar viðgerðir í býráðnum.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini. Málið skal hava tvinnar viðgerðir tá talan er um eykajáttan.

## 13/24
## 24/00055-1 Útskifting av ljósum í ítróttarhøllini í Trongisvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.03.2024 | 18/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2024 | 18/24 |
| 3 Býráðið | 25.03.2024 | 13/24 |

**Málslýsing: Georg Müller 14.02.23**
Ljósini í ítróttarhøllini í Trongisvági eru ótíðarhóskandi, og er tekniska deild farin at kanna, um møguleiki er at skifta tey út við betri og orkusparandi ljós. Vit hava fingið tilboð frá veitara uppá tað tilfarið, vit skulu brúka.
Tað er nógv viðlíkahald av gomlu ljósrørunum.

Viðm.: Hetta málið bleiv sett í gongd í fjør, og er málið viðgjørt og samtykt í mentanarnevndini.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

| | |
|---|---|
| Prísur fyri nýggj ljósarmatur o.a.(tilboð 301354203): | 155.490,94 kr/uttan mvg |
| Prísur fyri nýggja ljósstýring (DALI): | 25.942,81 kr/uttan mvg |
| Prísur fyri forritan av ljósstýring: | 10.750,00 kr/uttan mvg |
| Mettur kostnaður, arbeiðsløn o.a.: | 50.000,00 kr/uttan mvg |
| **Samlaður kostnaður:** | **242.183,75 kr/uttan mvg** |

**Tilmælið:**
Mælt verður til at taka av tilboðunum hjá Lemvigh-Müller, og at seta arbeiðið í gongd sum skjótast, so tað kann gerast í vár, tá høllin ikki verður brúkt so nógv.

**Tekniska nevnd 06. marts 2024:**
Nevndin er kunnað.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2024:**
Málið er viðgjørt og kunna. Fíggjarnevndin mælt einmælt til, at taka av fyriliggjandi tilboði, og at arbeiði verður sett í gongd og avgreitt skjótast tilber.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**14/24**
**24/00036-2 Umsókn um broyting av byggisamtikt fyri matr. nr 16 á Sevmýri**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.02.2024 | 6/24 |
| 2 Býráðið | 25.03.2024 | 14/24 |

**Málslýsing:**
Umsókn um broyting av verandi byggisamtykt fyri matr. nr. 16 á Sevmýri, Froðba
Núverandi eigari av økinum Sp/F 01.07.2019 ynskir, at Frítíðarøki F verður broytt til Miðstaðarøki A

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Tekniska nevnd 07. februar 2024:**
Nevndin mælir til at broyta byggisamtyktina fyri økið til Miðstaðarøki A.
Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá tekniskunevnd at broyta byggisamtyktina fyri matr.nr. 16. á Sevmýri frá verandi Frítíðarøki «F» til ístaðin Miðstaðarøki «A».

**15/24**
**24/00088-5 Kommunusamanlegging tilmælið um ”Vegleiðandi fólkaatkvøða"**

**nú álitið er handa 18. mars 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.03.2024 | 15/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 19. Mars 2024**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at viðgerða álitið frá arbeiðsbólkinum um kommunusamanlegging, har støða verður tikin til tilmælið um at skipa fyri ”Vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging”. Eisini mælir borgarstjórin til, at býráði heitur á arbeiðsbólkin um at arbeiða víðari við málinum, áðrenn býráðið tekur endaliga støðu til kommunusamanlegging á einum seinni býráðsfundi.

**Lógargrundarlag:**
- Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023.
- Løgtingslóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 137 frá 22. september 2020
- løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur.
    - **§ 1.** løgtingslóg ásetir treytirnar fyri sjálvbodnum kommunusamanleggingum og eindum, ið sjálvbodnar samanleggingar ella kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur skulu halda seg innanfyri.
    - **§ 2.** Sjálvbodnar kommunusamanleggingar ella kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur kunnu verða framdar/framd innan hesar eindir:
        - 7) Suðuroy, t.e. Hvalbiar, Tvøroyrar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur
    - § 3. Avtalur um kommunusamanlegging skulu hava fyrilit fyri:
        - 1) at stovnseta kommunueindir, sum eru samfeldar landafrøðiliga og samferðsluliga,
        - 2) Møguleikunum fyri at menna fólka-, vinnu- og búskaparviðurskifti,
        - 3) at røkja kommunuuppgávur, og
        - 4) at fólkatalið helst skal vera í minsta lagi 2000 borgarar.
        - Stk. 2. Reglurnar í stk. 1, nr. 1 og 4 eru ikki galdandi fyri útoyggjakommunur, ið hava ætlanir um kommunusamanlegging sínámillum.
    - § 4. Áðrenn avtalur um kommunusamanleggingar verða góðkendar av landsstýrismanninum sambært § 5, skal semja í minsta lagi vera um:
        - 1) kommununavnið, har heitið "kommuna" skal vera ein partur av navninum,
        - 2) staðseting um, hvar og hvussu kommunustýrið finnur sær sæti,
        - 3) mannagongd um samanlegging av fyrisiting,
        - 4) uppgerð av ognar- og fíggjarviðurskiftum,
        - 5) tíðarfesting um, nær samanleggingin skal vera fullførd, og
        - 6) um staðbundnar nevndir skulu verða settar.
    - § 5. Avtalur um sjálvbodnar kommunusamanleggingar skulu góðkennast av landsstýrismanninum.
        - Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann, eftir góðkenning frá viðkomandi kommunum, umskipa og tillaga kommunumark, har kommunusamanleggingin ber við sær óhóskilig marknaviðurskifti. Eru ivamál um kommunumark, tekur landsstýrismaðurin avgerð í málinum.
        - Stk. 3. Avgerðir sambært stk. 1 og 2 eru endaligar innan fyrisitingina.

- § 6. Uttan mun til, um tað snýr seg um kommunusamanlegging, kann landsstýrismaðurin góðkenna eina umskipan av markinum í millum kommunur, um semja er teirra millum.
- § 7. Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging eftir ásetingunum í kommunuvallógini.
  - Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um vegleiðandi fólkaatkvøðu.

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Kristin Michelsen mælir býráðnum til at taka álitið frá arbeiðsbólkinum um kommunusamanlegging til eftirtektar, og at heita á arbeiðsbólkin um at fyrireika upppskot til fólkaatkvøðu í Tvøroyrar kommunu, ið verður lagt fyri býráðsfundin í apríl. -Einmælt samtykt.

**95.1/24**
**24/00089-2 RFF -Ráðið fyri Ferðslutrygd ársfundur 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.03.2024 | 95.1/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 19.03.2024**
Við hesum verður boðað limunum í Ráðnum fyri Ferðslutrygd frá, at ársfundur verður fríggjadagin hin 5. apríl 2024 í Løkshøll frá kl. 10.00 til kl 14.00.

Heitt verður á limirnar at boða frá, hvør møtir teirra vegna á ársfundinum í seinasta lagi týsdagin 25. mars kl. 12.00

**Lógargrundarlag:**
- Formaðurin kallar inn við 30 daga freist (§5)
- Uppskot til viðgerðar á ársfundinum skulu verða formanninum skrivliga í hendi í seinasta lagi 14 dagar fyri ársfundin og verða send limunum 7 dagar fyri fundin. (§6)
- Til ársfundin sendir hvør limur eitt umboð, sum hevur heimild at taka støðu vegna limin. (§4)

Nevndarval er annað hvørt ár og í 2024 standa tveir nevndarlimir fyri vali. Eisini skulu veljast tveir varalimir. Starvsnevndasrlimir kunnu verða afturvaldir.

Hesi mynda nevndina í RFF í dag:
- Jónhild Rasmussen, forkvinna (Betri trygging)
- Mikkel H. Frandsen, næstformaður (Ráð) - stendur fyri vali
- Vivian Johansen (Trygd) – stendur fyri vali
- Marjun Jógvansdóttir (Tórshavnar kommuna)
- Karl Leonsson (Føroya politi)
- Bergur Samuelsen, varalimur (Føroya lærarafelag) – stendur fyri vali
- Brandur Fríðmundsson, varalimur (Akstovan) – stendur fyri vali

Umframt skrá sambært viðtøkunum fara vit, sum vant, at hava okkurt fakligt upplegg. Hesaferð fara vit millum annað at frætta frá heilt feskari hugburðskanning millum føroyingar um ferðslu

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Kristin Michelsen mælir til, at Alvi Mortensen møtir á fundinum umboðandi Tvøroyrar kommunu.
Einmælt samtykt.

**95.2/24**
**24/00090-3 Kommunufelagið ársaðalfund 19. apríl 2024 -broyting av viðtøkum felagsins**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.03.2024 | 95.2/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 19.03.2024**
Kommunufelagið hevur fráboða, at aðalfundur felagsins verður 19. Apríl á Hotel Føroyum, har m.a. mál er á skrá, uppskoti til nýggjar viðtøkur fyri Kommunufelagið.

**Kommunufelagið kunnar um at:**

*Við einstøkum tillagingum, herundir varðveitslu av starvsbólkinum, var semja um tær broytingar, sum arbeiðsbólkurin hevur arbeitt við síðani eykaaðalfundin í desember 2023. Fyriliggjandi uppskot kann tí sendast borgarstjórunum til kunningar og møguligar viðmerkingar.*

*Ætlandi verður eitt endaligt uppskot til nýggjar viðtøkur lagt fyri aðalfundin 19. apríl 2024. Møguligar viðmerkingar viðmerkingar skulu tí vera okkum í hendi í seinasta lagi 2. apríl 2024 kl. 12.00*

*Samtykkir aðalfundurin nýggju viðtøkurnar verður tað við gildiskomu 1. januar 2025, tá ið nýggju kommunustýrini taka. Galdandi viðtøkur fara tá úr gildi.*

**Størri broytingarnar eru:**

• **Stýrið og starvsbólkurin niðurløgd**
• **Leiðslan í felagnum hereftir:**
– Aðalfundurin: Allir borgarstjórar (kommunustýrislimir kunnu møta)
– Borgarstjórafundurin: Allir borgarstjórar
– Formansskapurin: Forfólk, næstforfólk og 3 vanligir limir
– Starvsnevndir fyri KAF og BVS: 3 borgarstjórar (+ 1 fyri SEV og IRF í KAF)
– Borgarstjórafundurin velur 11 sessir – max 1 til hvørja kommunu
– Stovnað verður eitt Samstarvsráð við øllum forfólkum

• **Broytingar í atkvøðuvekt**
– Aðalfundurin: 1 atkv. pr. íbúgva, max 45% (sum í dag)
– Borgarstjórafundurin: 1 atkv. pr. 1.000 íbúgvar (sum hjá SEV)
– Formansskapurin: 1 atkvøða í part
– Kommunur yvir 1/3 av atkvøðutalinum á aðalfundinum
  • Kunnu krevja lim í formansskapi ella KAF

• **Nýggjur strukturur fyri KAF**
– Starvsnevnd við 5 limum og egnari starvsskipan
– Borgarstjórafundurin velur borgarstjórar til
  • Forfólk
  • Næstforfólk
  • 2. Næstforfólk
– Nevndarformaðurin í SEV fær 4. Sessin

– Nevndarformaðurin í IRF fær 5. Sessin

– Forfólkið í KAF gerst ikki partur av formansskapinum
– Forfólkið í KAF gerst partur av Samstarvsráðnum

• **Politisk nevnd fyri BVS**
– Starvsnevnd við 3 limum og egnari starvsskipan
– Borgarstjórafundurin velur borgarstjórar til
  • Forfólk
  • Næstforfólk
  • 2. Næstforfólk
– Forfólkið í BVS gerst partur av Samstarvsráðnum

• **Samstarvsráð (nýtt)**
– Forum fyri forfólkini í KF, KAF og BVS
– Umrøða mál av felags áhuga
– Skipað undir leiðslu av forfólkinum í KF
– Hittast umleið 4 ferð árliga
– Aðrir limir í formansskapi, KAF og BVS kunnu luttaka
– Ongar atkvøðureglur og onga starvsskipan
  • Snýr seg um samstarvið millum formansskapin og starvsnevndirnar

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til kunning og støðutakan.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**16/24**
**24/00091-2 Umsókn um byggiloyvi til uppsetan av stáltangum og goymslutangum - Varðin Pelagic**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 25.03.2024 | 19/24 |
| 2 Býráðið | 25.03.2024 | 16/24 |

**Málslýsing:**
Varðin Pelagic hevur søkt um byggiloyvi til at:

- Flyta ein av verandi avskurðstangum vesturum verandi útbygning á suðursíðuni á verðandi virkisbygningi.
- Seta upp 7 stk stáltangar sum hava eina hædd á 10,5 metur, hvør tangi er 500m3
- Seta 1 stk goymslutanga 38 m3 til goymslu av meyrusyru
- Kring tangarnar er neyðugt at stoypa tangagarð, tangagarðurin verður 2 metrar høgur.Tangagarðurin rúmar einum tanga av súrløgi, pluss10% eykað.

**Lógargrundarlag:**
Almenn byggisamtykt fyri Tvøroyrar Kommunu
Bygningskunngerðin

**Tilmælið:**
Mælt verður til at geva byggiloyvi, tað er innan fyri galdandi byggisamtykt.

**Vinnu- og havnanevndin 25. marts 2024:**
Nevndin mælir til at geva byggiloyvi, treytað av loyvum frá øðrum avvarðandi myndugleikum.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Eyð Eidesgaard metir seg at verða ógegniga í viðgerðini av málinum *“16/24 Umsókn um byggiloyvi til uppsetan av stáltangum og goymslutangum – P/F Varðin Pelagic”*, og fór av fundinum til hesa viðgerðina. Einmælt samtykt tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndin 25. mars 2024.

**Til kunningar**

**9/24**
**24/00004-1 Skattatøl 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 2/24 |
| 2 Býráðið | 29.02.2024 | 4/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2024 | 5/24 |
| 4 Býráðið | 25.03.2024 | 9/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2024**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2023/2024

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024/2025

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

## 10/24
## 22/00443-1 Borgarstjórin fráðboðar at hann fer í farloyvið/feriu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.03.2024 | 10/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 20.03.2024**
Borgarstjórin fráboðar, at hann fer í feriu frá 1 apríl til og við 28 apríl 2024, undantikið fríggjadagin 19 apríl, tá borgarstjórafundur og aðalfundur er hjá Kommunufelagnum.

Anita Vibergsdóttir kemur at røkja borgarstjórasessin í hesum tíðarskeiði.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023

*§ 24. Kemur tiltakslimur í staðin fyri borgarstjóran, tekur varaborgarstjórin við uttan so, at kommunustýrið skal velja nýggjan borgarstjóra, sbr. stk 2. Stk. 2. Er tiltakslimur komin inn fyri borgarstjóra ella varaborgarstjóra eftir reglunum í § 18, stk. 2, men sannlíkt er, at fráveran varir longri enn 2 mánaðir, skal kommunustýrið fyribils velja borgarstjóra ella varaborgarstjóra í teirra stað eftir reglunum í ávíkavist § 6, stk. 2 og stk. 3. Ásetingin í § 23, stk. 3 er somuleiðis galdandi.*

*§18, Stk. 2. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*

*Viðmerkingar til § 24 stk. 2.: Hevur borgarstjórin sambært § 18, stk. 2 forfall í minst 14 samfullar dagar, og er varaborgarstjórin vorðin fyribils borgarstjóri, kann val av virkandi borgarstjóra ikki fara fram, uttan so er, at varaborgarstjórin fær fráboðan um, at borgarstjórin væntandi hevur forfall í meira enn 2 mánaðir. Víst verður annars til viðmerkingarnar til § 23, stk. 3. Eftir hesum virkar varaborgarstjórin einans í borgarstjórans stað, tá ið borgarstjórin hevur bráðfeingis forfall, meðan kommunustýrið skal taka støðu til spurningin um, hvør skal verða borgarstjóri, tá fráveran varir longri enn 2 mánaðir*

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu og kommunustýrislógina, verður uppskotið við hesum latið býráðnum til kunning og støðutakan.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Málið var kunnað.

Fundurin lokin

_________________________________
Kristin Michelsen

_________________________________
Anita Vibergsdóttir

_________________________________
Mina Joensen

_________________________________
Frits Strøm

_________________________________
Bjarni Hammer

_________________________________
Kristina Roest

_________________________________
Eyð Jóna Eidesgaard